# Ongin orsøk hjá suðuroyingum at stúra fyri bergholinum

**Arbeiðið upp á bergholið ímillum Øravík og Hov verður boðið út í heyst og boringin byrjar tíðliga næsta ár, akkurát sum ætlað. Tað vissar Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, suðuroyingar um**

HOVSTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað er als onki hald í tíðindunum um, at tunnilin ímillum Øravík og Hov er útsettur. Tvørturímóti leggja vit alla orku í at fáa gongd á arbeiðið, sigur Bjarni Djurholm*

– Vit hava ikki útsett ætlanina at gera berghol ímillum Øravík og Hov.

Tað vissar Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum suðuroyingar staðiliga um.

– Tvørturímóti kann eg vissa suðuroyingar um, at vit arbeiða við tunlinum við allari teirri orku, vit hava.

Suðuroyingar eru annars farnir at stúra fyri bergholinum ímillum Øravík og Hov.

Ætlanin hevur verið, at arbeiðið at gera bergholið skal bjóðast út í heyst, so at farast kann undir sjálvan tunnilin tíðliga næsta ár.

Men í summar hevur Landsverkfrøðingurin kortini brúkt milliónir av krónur upp á at asfaltera tann gamla Hovsvegin, sum tunnilin er ætlaður at koma ístaðin fyri.

Suðuroyngar hava tí undrast á, at stórar upphæddir eru brúktar uppá at asfaltera ein veg, sum kortini skal takast úr brúki longu um tvey ár .

Og tað hevur av álvara kynt uppundir ein illgruna um, at Hovstunnilin verður ikki gjørdur kortini og tað er farið at ganga sum rótasúpan í Suðuroy, at tunnilin er útsettur í fleiri ár.

Og hetta hevur loypt órógv á suðuroyingar, tí júst Hovstunnilin verður mettur sum størsta einstaka frambrotið fyri innnanoyggja samferðsluna í Suðuroy, tí hann fer at binda oynna saman á ein heilt annan hátt enn nú.

### Arbeiða av kraft við tunlinum

Men Bjarni Djurholm vissar um, at tað er onki at stúra fyri.

Hann sigur, at ætlanin at gera Hovstunnilin er ikki útsett og enn minni slept.

– Tvørturímóti er stórur dentur lagdur á at fáa arbeiðið upp á tunnilin ígongd so skjótt sum gjørligt.

Hann sigur, at ráðgevarin hjá landsverkfrøðinginum mælti fyrr í ár til at fleiri royndarboringar vórðu gjørdar øravíkarmegin, tí har er lendið heldur vánaligt.

– Heldur enn ein, sendu vit tveir borivognar á staðið fyri at fáa boringarnar so skjótt frá hondini sum gjørligt, sigur Bjarni Djurholm.

Hann sigur, at tíverri hevur lendið verið so vánaligt, at tað seinka royndarboringunum nógv.

– Men landsverkfrøðingurin hevur fingið at vita, at hetta er eitt mál, sum hevur fremstu raðfesting.

Landsstýrismaðurin sigur, at ætlanin er, at royndarboringarnar skulu gerast lidnar so skjótt sum gjørligt, so at tilfarið kann kannast.

Síðani skal endaliga tunnilslinjan stingast út í kortið og útbjóðingartilfarið gerast klárt.

Samstundis skal uppskot um eina verklagslóg fyri Hovstunnilin leggjast fyri tingið í heyst. Hetta er ein lóg, sum gevur landsstýrismanninm heimild til at seta arbeiðið ígongd.

– Hovstunnilin skal bjóðast út í heyst, so at arbeiðið kann byrja so tíðliga sum gjørligt næsta ár, sigur Bjarni Djurholm.

Tað liggur eisini fast, at tunnilin skal gerast onkustaðni niðri á dalinum, sum er nógv tann betri tunnilin. Men úrslitið av royndarboringunum kemur so at vísa, akkurát hvussu linjan fer at liggja.

Upprunaliga var ætlanin at gera tunnilin longur uppi í fjallinum, men tann ætlanin er slept.

Bjarni Djurholm sigur eisini, at samgongan er eisini sinnað til at seta pening av á fíggjarlógini næsta ár til tunnilin.

Hann sigur, at umleið 40 milliónir fara at verða settar av til Hovstunnilin á fíggjarlógini fyri 2005.

Á Ólavsøku fer løgmaður at leggja fyri tingið ein lista yvir tey mál, sum landsstýrið ætlar at fremja. Og á tí listanum stendur, at ein ein verklagslóg fyri Hovstunnilin skal leggjast fyri tingið í heyst, sigur Bjarni Djurholm.

# Krevur at flutningsstuðulin hækkar aftur beinanvegin

**– Flutningstuðulin skal hækka aftur beinanvegin, krevur Henrik Old, formaður í vinnunevndini**

FLUTNINGSSTUÐUL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Nú má øll rímilig freist metast at vera farin. Nú er onki at bíða eftir longur so nú skal flutningstuðulin hækkast, sigur Henrik Old, formaður í vinnunevndini*

– Nú kunnu vit ikki bíða longur.

Henrik Old, løgtingsmaður og formaður í vinnunevndini hjá løgtinginum er við at missa tolið.

Hann krevur, at flutningsstuðulin til at flyta fisk ímillum teir ymsu partarnir í landinum, verður hækkaður aftur beinanvegin.

Tað var longu í vár, at Henrik Old segði við Sosialin, at samgongan avtalaði, at flutningsstuðulin skuldi hækka og tá segði hann eisini, at ein kunngerð um hetta varð klárt at lýsa fyrsta dagin.

Men enn er onki hent.

– Nú eru vit komin langt út um tíðarfreistina og nú skal kunngerðin setast í gildið, sigur formaðurin í vinnunevndini.

Hann sigur málið hevur drigið út, tí tað hevur verið til ummælis hjá nevndum og serfrøðingum, sum hava við fiskivinnumál at gera og sum skulu gera síni tilmæli í slíkum førum.

Tað er onki dulsmál, at flutningsstuðulin er illa lýddur nógva staðni og Henrik Old sigur, at tað er heta, sum hevur seinkað viðgerðini.

– Men nú mugu vit síggja burtur frá øllum hesum serfrøðingatilmælunum. Nú má metast, at vit eru komin langt út um tíðarfreistina, so nú skal kunngerðin lýsast. Nú er onki at bíða eftir longur, leggur hann afturat. Hann skilir ikki, hví summi hava so ilt av flutningsstuðlinum.

– Er ongin fiskur at flyta, fellur stuðulin aftur til landskassan. Verður stuðul útgoldin, er tað tí at arbeiðið er skapt kring um í landið og tað kann ongin hava ilt av.

### Tryggjar javna kapping

Flutningsstuðulin er ein stuðul, sum serliga kemur virkinum í útjaðaranum til góðar, tí so kunnu tey fáa stuðul til at flyta fisk frá uppboðssølu til virkið til virkingar.

Verður Suðuroyggin tikin sum dømi, hevur stuðulin verið 24 oyru fyri hvørt kilo av fiski. Men seinasta summar varð hann lækkaður niður í 14 oyru fyri kilo.

– Hetta var ein dyggur smeitur fyri virkini kring landið og í Suðuroynni hevur lítið og onki fiskarbeiðið verið hetta síðsta áriið

Henrik Old ivast ikki í, at ein orsøk til, at arbeiðið er minkað so nógv, er, at tann langi flutningurin ger, at virkini í útjaðaranum eru nógv verri fyri at kappast um fiskin, enn virkini í miðstaðarøkinum.

– Tí er tað ein avgjørd fortreyt, at kappingarstøðan ímillum virkini verður útjavnað og tí hevur samgongan avgjørt at hækka flutningsstuðulin aftur, so at hann áleið kemur upp aftur á tey 24 oyruni fyri kilo, sum hann var, áðrenn hann varð lækkaður.



# Suðuroyingar á ferð ígjøgnum søguna

**Hetta vikuskiftið verður mentanarvikuskifti í Suðuroy, har øll søvn í oynni eru opin**

MENTANARVIKUSKIFTIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Sunnudagin var Johanna við fullum skipi eina sera væleydnaða ferð í Tjaldavík, har borðreitt var við teilendskum grillmati. Brandur Enni spældi eisini*

Hetta vikuskiftið verður eitt gylt høvi at kunna seg við søgu og mentan í Suðuroynni.

Ferðavinnan í Suðuroy skipar fyri mentanarvikuskiftið, har øll søvn í oynni eru opin, eins og kirkjur og aðrir stovnar.

Søvnini í verða opin leygardagin og sunnudagin kl. 15-18 og í Porkeris- og Fámjins kirkju, verður opið sunnudagin frá klokkan 15-18.

Á hvørjum staði eru heilmildarfólk og greiða frá meðan opið er.

Og søvnini í Suðuroy eru helst fleiri í tali enn fólk geva sær far um.

Í Vági er Ruth Smith savnið í Gamla Skúla. Ruth Smith, er ein av okkara gitnastu listamálarum og er serliga kend fyri sínar frálíku sjálvsmyndir. Á Ruth Smith savninum eru 27 myndir harav nógvar eru málaðar úr heiminum hjá henni á Nesi. Ruth druknaði á Vágsfirði á várið í 1958. Í einum minningarorð-um eftir Ruth stendur at lesa, at listin varð meiri neyðug fyri hana enn matur og drekka. Tað kostar 30 krónur at koma inn á savnið Í Vági er eisini Bygdarsavnið í Gamla skúla Á savninum eru lutir úr Vági sum eru latnir savninum, eitt nú handverkaraamboð, umframt ymiskt frá gerandisdegnum í einum vanligum húsum. Lutirnir eru nógvir so tað er vert eina vitjan. Kostnaður fyri at vitja savnið er 20 krónur fyri hvønn.

Og á Seglloftinum í Stóra pakkhúsið er eisini eitt sjósavn. Framsýningin, sum nú er á sjósavninum, er um fiskivinnu á sjógvi og landi í Vági frá mitt í 1800 talinum og fram til seinra heimsbardaga. Eisini ber til at síggja ein film frá 1927 og hoyra øðrvísi ljóðmynd, sum helst ikki finst á øðrum søvnum í landinum. Tað kostar 20 krónur at síggja sjósvanið.

Á Tvøroyri er eisini eitt sjó- og bygdarsavnið, sum er í gomlu doktarahúsinum, Í savninum eru ymsir lutir , so sum hándverkaraútgerð, skrivimaskina, ymiskt frá »gamla Smyrli« (1931) osfr. Kostnaðurin er 10 krónur fyri hvønn.

Eisini í Sandvík er eitt savn. Sandvík er ein av fáu bygdunum í Føroyum, sum hevur eini vælhildin aldargomul hús varveitt í bygdini og har tað ber til at síggja, hvussu forfedrarnir húsaðust. Húsini Uttan Ánna, stóðu liðugt bygd í 1866. Tað kostar 20 krónur at koma inn á savnið í Sandvík.

Í bóndahúsunum í Sandvík ber eisini til at keypa sær ein drekkamunn við onkrum heimabakaðum afturvið.

Í Hvalba ber eisini til at sleppa at síggja kolanámið í Hvalba. Hetta er einasta kolanámið í landinum, sum enn er virkið. Arbeiðsútturin er tann sami sum fyrr í tíðini, við hakkara og spaka. Kostnaður kr. 50,- fyri hvønn.

Umframt søvnini, ber eisini til at síggja kirkjuna í Porkeri.

Í tíðarskeiðinum 1829 - 1847 vóru 10 kirkjur bygdar ymsastaðni í Føroyum. Hesar líkjast allar rættiliga nógv, og tær hava allar felagsheitið »gomlu trækirkjurnar«. Porkeris kirkja er ein av hesum trækirkjunum. Hon er bygd í 1847, og er einasta av sínum slag í Suðuroy. Heimildarfólk greiðir frá um søguna hjá kirkjuni og hvønn týdning hon hevur havt í gerandislívinum og her kostar onki at sleppa inn.

Somuleiðis ber til at síggja kirkjuna í Fámjin. Hon varð bygd í 1876 og í kirkjuni er eisini fyrsta, føroyska flaggið, sum ein ungur studentur úr Fámjin teknaði í 1919. Í forkirkjuni er eisini forvitnisligur rúnarsteinur.

Og tey, sum hava hug til nýggja list, kunnu fara í Gallarí Oynna á Tvøroyri, har danska listakvinnan, Rita Mortensen, hevur framsýning.Tað kostar 20 krónur at fara á listaframsýn-ing.

### Til gongu leygardagin

Leygasrdagin verður skipað fyri gongutúri úr Sumba til Vikarbyrgi. Gingið verður eftir gomlu varðagøtuni. Bussur koyrir av kunningarstovuni á Tvøroyri klokkan 10 og úr Vági klokkan 10.30.

Tilmelding er 374342 ella 372480 í seinasta lagi fríggjadagin klokkan 16. Túrurin kostar 100 krónur, men børn kunnu koma við fyri onki.




**“KOM SUÐOR — TAÐ ER NOGV NOGV LETTARE”**

Kunningarstovan í Vági tel 374342 / 284342, Kunningarstovan á Tvøroyri tel 372480 / 284480, Frítíðarhúsini í Lopra tel 374342, Hotel Bakkin tel 373961, Hotel Øravík tel 371302, Hotel Tvøroyri tel 371171, Gistingarhúsið undir Heygnum tel 372046